IRF

# ÁRSROKNSKAPUR OG ÁRSFRÁGREIÐING 2003



# ÁRSROKNSKAPUR OG ÁRSFRÁGREIÐING 2003

NEVND

*Standandi frá vinstru:*
Johannes Klein, *næstformaður*
Gerhard Lognberg
Joen Magnus Rasmussen

*Sitandi frá vinstru:*
Hilmar Danielsen, *formaður*
Randi Jacobsen
Niels Jacob Thomsen



# INNIHALD


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagsskapin | 6 |
| IRF 2003 fyriskipan | 7 |
| Limakommunur og fólkatal | 8 |
| Roknskaparátekning | 9 |
| Grannskoðanarátekning | 9 |
| Formansfrágreiðing (Chairman's Report) | 10 |
| Búskapur | 18 |
| Høvuðstøl | 18 |
| Frágreiðing til ársroknskapin | 20 |
| Rakstrarroknskapur 2003 | 21 |
| Fíggjarstøða pr. 31.desember 2003 | 22 |
| Notur til roknskapin | 23 |
| Rakstrarúrslit samanborið við ætlan 2003 | 34 |
| Gjaldførisfrágreiðing 2003 | 35 |
| Gongdin í rakstrinum 1995-2003 | 36 |

# UPPLÝSINGAR UM FELAGSSKAPIN

FELAGSSKAPURIN

| | |
|---|---|
| Navn: | L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF |
| Bústaður: | 520 Leirvík |
| Heimstaðarkommuna: | Leirvíkar Kommuna |
| Arbeiðsgevaratal: | 353.477 |
| Stovningarár: | 1979 |
| Starvsfólk: | 70 |
| E-mail: | irf@irf.fo |
| Heimasíða: | www.irf.fo |
| Tel.: | 473000 |
| Fax: | 473340 |

NEVND

Hilmar Danielsen, Norðoyggjar, *formaður*
Johannes Klein, Vágar og Mykines, *næstformaður*
Gerhard Lognberg, Sandoy, Skúvoy og Dímun
Joen Magnus Rasmussen, Eysturoy
Randi Jacobsen, Norðstreymoy, Nólsoy
Niels Jacob Thomsen, Suðuroy



STJÓRN

Poul Andrias Joensen, *stjóri* – poul@irf.fo
Erik Lervig, *fíggjarleiðari* – erik@irf.fo

GRANNSKOÐARI

P/F Grannskoðaravirkið INPACT
R.C.Effersøesgøta 26
Boks 191, FO-110 Tórshavn
Tlf. 314700, Fax 313815
E-mail: inpact@inpact.fo

Ársroknskapurin fyri 2003 er góðkendur á ársaðalfundinum tann ____________ 2004

________________________

Fundarstjóri:

# IRF FYRISKIPAN 2003

45 LIMAKOMMUNUR

AÐALFUNDUR

NEVND



Hilmar Danielsen
*formaður*



Johannes Klein
*næstformaður*



Gerhard Lognberg



Joen Magnus
Rasmussen



Randi Jacobsen



Niels Jacob
Thomsen



Poul Andrias Joensen
*stjóri*



Erik Lervig
*fíggjarleiðari*



Ingvard Fjallstein
*umhvørvisleiðari*

**Umsiting**



Sólrun Poulsen

Umsiting
Bókhald
Lønarroknskapur
Journal
Tryggingar

**Brennistøð & Spilloljuverk**



Páll Vík

Móttøka
Brenning
Viðlíkahald
Søla

**Skiljihøllin, endurnýtsla og Rottangaskipanin**



Adelbert
Ellingsgaard

Móttøka
Skiljing
Avskipan
Søla

**Suðuroy**



Martin Andrias
(Diaba) Johannesen

Innsavning
· Húsarhald
· Virki
Bingjupláss
Umlastingarstøð
Tyrvingarpláss

**Innsavning, Norðoyggjar, Meginøkið og Sandoy**



Jógvan Júst Olsen

Innsavning
· Húsarhald
· Virki
Bingjupláss
Jarnpláss
Flutningur
Tyrvingarpláss
Bingjur

**Verkstaður**



Sigurð Rasmussen

Bilar
Bingjur
Maskinur

## L I M A K O M M U N U R   O G   F Ó L K A T A L

| Kommuna | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | Primo 2004 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bíggjar Kommuna | 53 | 53 | 54 | 65 | 58 | 55 | 64 | 79 | 89 |
| Eiðis Kommuna | 626 | 654 | 673 | 683 | 687 | 705 | 720 | 727 | 717 |
| Elduvíkar Kommuna | 82 | 85 | 95 | 106 | 104 | 94 | 104 | 91 | 88 |
| Fámjins Kommuna | 119 | 119 | 122 | 122 | 116 | 111 | 113 | 111 | 111 |
| Fuglafjarðar Kommuna | 1.419 | 1.423 | 1.467 | 1.465 | 1.495 | 1.546 | 1.587 | 1.591 | 1.591 |
| Fugloyar Kommuna | | | | | | | 48 | 45 | 46 |
| Funnings Kommuna | 106 | 102 | 98 | 98 | 96 | 90 | 85 | 79 | 83 |
| Gjáar Kommuna | | 65 | 65 | 63 | 64 | 58 | 55 | 59 | 537 |
| Gøtu Kommuna | 871 | 894 | 902 | 931 | 960 | 969 | 1.005 | 1.032 | 1.043 |
| Haldarsvíkar Kommuna | 279 | 264 | 268 | 264 | 256 | 255 | 259 | 271 | 263 |
| Hósvíkar Kommuna | 225 | 220 | 237 | 247 | 240 | 243 | 266 | 281 | 285 |
| Hovs Kommuna | 137 | 131 | 130 | 124 | 121 | 121 | 123 | 133 | 132 |
| Húsa Kommuna | 54 | 53 | 65 | 62 | 60 | 62 | 63 | 68 | 62 |
| Húsavíkar Kommuna | 167 | 160 | 154 | 154 | 152 | 141 | 141 | 140 | 140 |
| Hvalbiar Kommuna | 772 | 774 | 784 | 765 | 780 | 764 | 762 | 765 | 771 |
| Hvalvíkar Kommuna | 305 | 310 | 321 | 345 | 347 | 356 | 363 | 370 | 391 |
| Hvannasunds Kommuna | 446 | 433 | 431 | 426 | 443 | 449 | 447 | 453 | 446 |
| Klaksvíkar Kommuna | 4.493 | 4.500 | 4.515 | 4.602 | 4.679 | 4.779 | 4.776 | 4.794 | 4.846 |
| Kollafjarðar Kommuna | 888 | 896 | 906 | 905 | | | | | |
| Kunoyar Kommuna | 125 | 129 | 129 | 131 | 136 | 141 | 133 | 134 | 135 |
| Kvívíkar Kommuna | 572 | 553 | 567 | 569 | 561 | 563 | 589 | 580 | 594 |
| Leirvíkar Kommuna | 742 | 774 | 808 | 805 | 816 | 821 | 826 | 865 | 885 |
| Miðvágs Kommuna | 959 | 960 | 974 | 951 | 953 | 973 | 1.001 | 1.020 | 1.060 |
| Mikladals Kommuna | | | 80 | 78 | 78 | 77 | 78 | 79 | 74 |
| Mykinesar Kommuna | | | 18 | 18 | 16 | 19 | 22 | 21 | 19 |
| Nes Kommuna | 1.024 | 1.072 | 1.065 | 1.100 | 1.113 | 1.170 | 1.169 | 1.197 | 1.223 |
| Nólsoyar Kommuna | 244 | 242 | 246 | 261 | 259 | 262 | 268 | 268 | 262 |
| Oyndafjarðar Kommuna | 162 | 168 | 165 | 165 | 165 | 171 | 164 | 181 | 183 |
| Porkeris Kommuna | 387 | 371 | 366 | 359 | 359 | 359 | 379 | 373 | 367 |
| Runavíkar Kommuna | 2.265 | 2.337 | 2.364 | 2.381 | 2.411 | 2.475 | 2.516 | 2.556 | 2.629 |
| Saksunar Kommuna | | | | | | | 32 | 34 | 32 |
| Sandavágs Kommuna | 672 | 661 | 673 | 680 | 688 | 684 | 693 | 723 | 730 |
| Sands Kommuna | 549 | 541 | 529 | 560 | 562 | 554 | 600 | 578 | 587 |
| Sjóvar Kommuna | 951 | 966 | 980 | 989 | 1.003 | 1.023 | 1.029 | 1.042 | 1.043 |
| Skála Kommuna | 618 | 623 | 624 | 639 | 622 | 651 | 673 | 693 | 711 |
| Skálavíkar Kommuna | 181 | 172 | 162 | 162 | 163 | 171 | 191 | 181 | 203 |
| Skopunar Kommuna | 525 | 507 | 504 | 508 | 488 | 493 | 480 | 496 | 497 |
| Skúvoyar Kommuna | | | 90 | 89 | 86 | 86 | 81 | 62 | 68 |
| Sørvágs Kommuna | 888 | 892 | 898 | 895 | 886 | 908 | 942 | 961 | 976 |
| Sumbiar Kommuna | 433 | 433 | 444 | 425 | 403 | 407 | 432 | 433 | 414 |
| Sunda Kommuna | 426 | 437 | 445 | 449 | 456 | 454 | 466 | 479 | 489 |
| Svínoyar Kommuna | | | | | | 63 | 61 | 73 | 58 |
| Tvøroyrar Kommuna | 1.827 | 1.817 | 1.790 | 1.795 | 1.789 | 1.829 | 1.846 | 1.867 | 1.850 |
| Vágs Kommuna | 1.417 | 1.397 | 1.400 | 1.418 | 1.403 | 1.375 | 1.417 | 1.450 | 1.433 |
| Vestmanna Kommuna | 1.140 | 1.143 | 1.150 | 1.150 | 1.211 | 1.237 | 1.240 | 1.237 | 1.240 |
| Viðareiðis Kommuna | 309 | 310 | 297 | 309 | 317 | 321 | 337 | 347 | 342 |
| **Tilsamans** | **27.523** | **27.641** | **28.053** | **28.314** | **27.596** | **28.019** | **28.650** | **29.013** | **29.265** |

# R O K N S K A P A R Á T E K N I N G

Ársfrágreiðing og ársroknskapur felagsskapsins fyri 2003
verður lagdur fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Leirvík, 05.03.2004

Stjórn

Poul Andrias Joensen
*Stjóri*

Erik Lervig
*Fíggjarleiðari*

Nevnd

Hilmar Danielsen
*Formaður*

Johannes Klein
*Næstformaður*

Gerhard Lognberg

Joen Magnus Rasmussen

Randi Jacobsen

Niels Jacob Thomsen

# G R A N N S K O Ð A R A Á T E K N I N G

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá L/F Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum IRF fyri 2003, sum leiðslan hevur sett upp.

## GRANNSKOÐANIN

Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í ársroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rætta mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum

Leirvík, 05.03.2004
P/F Grannskoðarvirkið Inpact
*statsaut. revisorar*

Jógvan Amonsson
*statsaut.revisor*

Eilif Petersen
*skrás. grannskoðari*



# FORMANSFRÁGREIÐING

### UMLEGGINGAR OG SPARINGAR

Seinastu árini hevur nógv orka verið løgd í at minka um rakstrarútreiðslurnar hjá IRF. Hetta er m.a. gjørt við rationaliseringum s.s. keyp av nýggjum og meira effektivum bilum, optimering av brennistøðini o.s.v.

Nevnd og leiðsla hava aftur í heyst gingið ígjøgnum allar rakstrarpartar í felagnum. Út frá hesum varð gjørt av, at gera nakrar broytingar í innsavningini av húsarhaldsruski og virkisburturkasti og innsavning av rottangaevju.

Eftir umskipingina er innsavning av húsarhaldsruski meira einsháttað norðanfjørðs, og innsavning av virkisburturkasti verður gjørd við færri og størri bilum.

Rottangaskipanin hevur verið rikin eftir sama leisti frá byrjan, men nú varð mett, at tíðin var búgvin til at gera broytingar. Eftir broytingina minkar orkan til at tøma tangar nakað, men tó ikki meira enn mett er at vera ráðiligt.

Umskipingarnar vóru settar í verk frá 1. februar 2004, og tær høvdu við sær, at starvsfólkatalið minkaði við 6 fulltíðarstørvum, 3 úr ruskinnsavningini, 2 úr rottangaskipanini og einum á verkstaðnum.

Mett verður, at hesar broytingar fara at minka um íløgu- og rakstrartørvin á størri amboðum komandi árini.

Tað hevði ikki borið til at gjørt hesar rationaliseringar, um ikki øll ruskinnsavningin var undir einum hatti.

### ARBEIÐSBÓLKUR

Einki spurdist burturúr hjá arbeiðsbólkinum, sum landsstýrismaðurin í umhvørvismálum setti, og hvørs arbeiðs setningur var:

- at greina ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á burturkastsøkinum,
- at meta um víðkaðar samstarvmøguleikar millum verandi brennistøðir, og
- at kanna ymiskar møguleikar fyri at nýta umhvørvisgjøld.

Vónandi letur nýggi landsstýrismaðurin í umhvørvismálum arbeiðsbólkin halda fram.

Tað er okkara vón, at málið verður tikið upp í fullum álvara, soleiðis at ein loysn er klár til 2005.

## ENDURNÝTSLA

### INNSAVNING AV PAPPÍRI OG PAPPI

Nøgdin av pappíri og pappi er nógv minni, enn vit frá byrjan høvdu roknað við. IRF útflutti 895 tons í 2003, sum er ein vøkstur upp á 22,6% í mun til 2002.

Neyðugt er framvegis at lýsa, nær hvíti posin verður heintaður, annars eru ov nógv húski, sum ikki seta hvita posan útum. Tá kann hann enda á bingjuplássinum í bingjuni, til tað sum skal brennast, tí enn eru nógvar kommunur, sum ikki hava umskipað bingjuplássið, so til ber at takað ímóti pappír og pappi. Hetta er at harmast um, tí vit hava annars ta fatan, at fólk sum heild eru sera væl nøgd við nýggju endurnýtsluplássini, og at tey har kunnu fáa vegleiðing um skiljing av burturkasti v.m.

Annars skipaði IRF fyri skeiði fyri starvsfólkum á endurnýtsluplássunum í apríl. Undirtøkan var góð.

### SKILJIHØLLIN Á HAGALEITI

Arbeiðið í skiljihøllini er lagt nakað um í 2003, soleiðis at størri nøgd av pappíri og pappi fæst ígjøgnum skipanina nú enn fyrstu árini.

IRF og Tórshavnar kommuna hava undirskrivað sáttmála um móttøku av pappíri og pappi frá húsarhaldum og virkjum í Tórshavnar kommunu til Skiljihøllina á Hagaleiti. Hetta kemur vónandi at hava við sær, at nøgdin av pappíri og pappi kemur at økjast komandi árini, og sostatt eisini at økja munandi um samlaðu brenniorkuna í landinum.

### JARN OG BILVRAK

IRF og Tórshavnar kommuna samstarva

# CHAIRMAN´S REPORT

### RESTRUCTURING AND COST SAVINGS

In recent years a lot of resources have been allocated to the task of reducing IRF´s operating costs, e.g. through rationalizations, such as the acquisition of new and more effective vehicles, optimizing the incinerator etc.

The board and the management have reviewed every unit of IRF´s operations. This led last autumn to a decision to make some changes in the collection of domestic waste, industrial waste and sludge from digestion tanks.

The restructure uniformed the collection in the northern islands, and fewer but bigger vehicles manage to collect the industrial waste.

The sewage tank service has remained unchanged since it started, but now it was decided to make some modifications. Allthough the modifications have reduced the capacity to empty tanks slightly, it is still acceptable.

The reorganization was implemented on February 4th 2004 and this led to a reduction of employees by 6 full-time jobs, 3 in the waste collection, 2 in the sewage service and 1 in the maintenance shop.

We estimate that these changes will reduce both the need for investments and operating expenses in future years.

These effiency improvements are only possible because all the collection is under one umbrella.

### WORKING COMMITTEE

No conclusion was reached by the working committee formed by the minister of environmental issues. The remit of the commission was as follows

- to analyse the division of responsibilities between the government and the municipalities as far as waste is concerned
- to estimate the possilities for further cooperation between the two plants, and
- to look into different possibilities of implying environmental taxes

We hope that the new minister wants the committee to continue its work.

Our hope is that the matter will be dealt with seriously and that a solution will be reached by 2005.

## RECYCLING

### COLLECTING PAPER AND CARDBOARD

The amount of collected paper and cardboard is far below initially estimated levels. IRF shipped 895 t in 2003, an increase of 22,6% compared to 2002. The announcement of the time for the collection of white bags is still necessary, to make sure that people place their bag outdoors, and we thereby



um jarn og bilvrak, sum verða send til jarnplássið hjá KB, haðani alt verður sent av landinum til endurnýtslu.

Í 2003 hevur IRF móttikið 3.074 tons av jarni og 230 bilvrak; hetta er nakað minni enn í fjør.

### HÁORKUBURTURKAST

Stórsekkir, bildekk og trol verður roknað sum háorkuburturkast. IRF móttók 305 tons av hesum í 2003.

### STÓRSEKKIR

Størsti parturin av stórsekkjunum kemur frá alivinnuni. Stórsekkir frá ILA raktum alibrúkum skulu brennast. Allir aðrir stórsekkir verða sendir av landinum til endurnýtslu.

### BILDEKK

Øll bildekk verða send til Danmarkar, har tey verða endurnýtt.

### TROL

Trol og gørn verða framhaldandi send til Íslands til endurnýtslu.

### ELEKTRONIKKUR

IRF hevur sent brúkt elektronisk tól og tílíkt til góðkent hagreiðingarvirki tey seinastu árini. Nøgdin er støðugt vaksandi. Frá 2001 til 2003 er nøgdin økt frá 1,8 tons til 28,8 tons.

### SPILLOLJUVERKIÐ Á KAMBSDALI

IRF hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um innsavning og viðgerð av spillolju. Játtanin á Løgtingsfíggjarlógini er upp á 2,75 mió. kr. Vit meta at játtanin er í minna lagi, og átti at verið hækkað. Eins og í 2000 og 2001 hevði IRF eitt hall av Spilloljuverkinum í 2003.

Í 2003 móttóku vit 3.022 $m^3$ av spillolju, og seldu 1.372 $m^3$. Reinsaða oljan verður, eins og undanfarin ár, í høvuðsheitum seld til Fjarhitafelagið í Tórshavn og Havsbrún í Fuglafirði.

### ROTTANGATÆNASTAN

Bæði sjálv tømingin av rottangum og arbeiðið á rottangaplássunum gongur sum ætlað, uttan stórvegis trupulleikar.

Ikki hevur borið til at finna nakað egnað rottangapláss í Norðuroyggjum.

Klaksvíkar kommuna hevur tó lovað okkum at halda fram á Grótrætt, til onnur loysn er funnin. Arbeitt verður tí við at byggja eina serskilda móttøku til lívrunnið burturkast og slamm á brennistøðini, men meira um hetta seinni.

Í 2003 tømdi IRF uml. 7.800 rottangar, meðan uml. 400 skrásettir tangar ikki vórðu tømdir, sum oftast tí at fólk nokta tøming, ella tí at tangin ikki er atkomuligur. Tað eru ENN uml. 800 húsarhald, sum ikki hava nakran rottanga, men bert lata skarnið renna út í ánna ella oman í fjøruna.

### KLOAKKSKIPANIN

IRF hevur nú tríggjar slamsúgvarar, sum verða nýttir kring alt landið. Bilarnir eru rættiliga nógv umbidnir, og er sum oftast bíðitíð upp á umbidnu arbeiðini. Fyri at minka um bíðitíðina hevur verið neyðugt at hava fýra mans knýttar at bilunum í 2003.

ENDURNÝTSLA SEINASTU 5 ÁRINI




## BRENNING

### BRENNISTØÐIN

Ovnurin var í rakstri 7.708 tímar ella 321 samdøgur í 2003, hetta er 17 samdøgur minni enn í 2002. Brend vóru 16.858 tons móti 18.470 tonsum í 2002, ella 2,19 tons um tíman.

Arbeitt hevur verið við at finna eina loysn, so at brennistøðin kann lúka øll áløgd umhvørviskrøv ultimo 2005. Babcock & Wilcox Vølund ApS (BWV) hevur kannað ovnin mars 2003 og gjørt eina CFD[1] – útrokning av ovninum. Kanningin er sera áhugaverd og vísir heilt greitt, at við at umbyggja ovnin nakað ber til at økja um brenniorkuna við uml. 0,2 tonsum um tíman, ella uml. 1.500 tonsum um árið. Ætlanin er at umbyggja ovnin í 2004.

### LÍVRUNNIÐ BURTURKAST

Alt lívrunnið burturkast, sum kemur til brennistøðina, verður koyrt beinleiðis í

[1] *Computational Fluid Dynamics*

avoid that it ends up at the container station in a container for incineration.

There are still many people who don´t have access to a recycling station, where they can dispose of paper and cardboard. That is a pity, because we have got the impression that most people find the new recycling stations where they can be guided on how to seperate the waste, very satisfying.

IRF has arranged for a course for the recycling station´s staff. Many of them made use of the opportunity.

### THE RECYCLING HALL ON HAGALEITI

The work in the recycling hall has been reorganized in 2003, in order to get more paper and cardboard through the system in comparison with the first years.

IRF and Tórshavnar Kommuna have signed an agreement implying that IRF handles the paper and cardboard collected in Tórshavnar Kommunu. This will hopefully increase the collected amount of paper and cardboard in years to come, and therefore also increase the incineration capacity in the country.

### IRON AND CAR WRECKS

IRF and Tórshavnar Kommuna are co-operating on iron and car wrecks. It is shipped abroad for recycling from KB´s scrapyard.

In 2003 IRF recieved 3.074 t of iron and 230 car wrecks, a bit less than last year.

### HIGH ENERGY WASTE

Big bags, tyres and trawls are considered as high energy waste. IRF recieved 305 t of these in 2003.

### BIG BAGS

The bulk of the big bags come from the fish farming industry. Bags from ILA infected fish farms have to be incinerated. The rest of them are shipped for recycling.



### TYRES

All tyres are exported to Denmark for recycling.

### TRAWLS

Trawls and nets are sent to Iceland for recycling.

### ELECTRONICS

IRF has exported an increasing amount of electronic waste to authorized plants for some years now. From 2001 to 2002 the amount has increased from 1,8 t to 28, 8 t.

### THE PLANT FOR TREATMENT FOR WASTE OIL ON KAMBSDALI

IRF has made a contract with Føroya Landsstýri on collecting and treating waste oil. The fiscal budget´s appropriation amounts to 2,75 mill. kr. We concider this amount insufficient, and would appreciate an increase.

As in year 2000 and 2001 IRF lost money on the plant in 2003.

In 2003 we recieved 3.022 $m^3$ of waste oil and sold 1.372 $m^3$. The refined oil is as in previous years mainly sold to Fjarhitafelagið P/F, Tórshavn and Havsbrún P/F, Fuglafirði.

### DIGESTION TANK SERVICE

Emptying the digestion tanks and the work on the digestion tank site is progressing pretty much as planned.

It has not been possible to find a new digestion tank site in Norðuroyggjum. Klaksvíkar Kommuna has given permission to use Grótrætt until another solution has been found. Plans are made to build a special reception for organic waste and sludge at the incineration plant. More about this later.

In 2003 IRF emptied about 7.800 digestion tanks, while ca. 400 registered tanks were not emptied, mostly because people did not want the service or because of inaccessibility to the tank. There are still about 800 households with no digestion tank, flushing directly into a river or down the sea side.

### THE SEWAGE TANK SERVICE

IRF has got two sludge exhausters operating all over the country.

There is a great demand for this service and customers must wait for their turn.



køstin, saman við tí vanliga burturkastinum. Hetta kann til tíðir vera sera óheppið, og kann seinka brenningini sera nógv. Støða er tí tikin til at byggja eina móttøku til lívrunnið burturkast og slamm við síðuna av brennistøðini. Nýggja skipanin skal m.a. kunna móttaka rottangaevju, slamm frá uppsamlingsbrunnum, slógv frá alivinnuni o.s.fr.

Harafturat verður arbeitt við eini skipan, har alt dálkandi vatn ella vatn, sum kann verða fongt við fiskasjúkuelvandi smáverum, verður sprænt í ovnin til køling. Dálkandi evni verða síðani fanga í nýggja roykreinsifiltrinum.

Við at pumpa evjuna beinleiðis í ovnin verður rokna við nógv javnari brenning, umframt at til ber at økja um móttøkuna av lívrunnum til brennistøðina.

Í 2003 hevur IRF móttikið 940 tons av lívrunnum burturkasti, harav 350 eru frá alivinnuni, meðan restin 590 tons eru frá flakavirkjum o.l.

## UMHVØRVISGÓÐKENNING

IRF fekk uppskot til umhvørvisgóðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvstovuni tann 7. mai 2002. Av tí at serfrøðingur frá Rambøll a/s var á vitjan hjá IRF ta vikuna, varð biðið um fund við Heilsufrøðiligu Starvstovuna 8. mai. Á fundinum vórðu nøkur av teknisku høvuðspunktunum í góðkenningini viðgjørd t.d. skráseting, roykreinsing, umhvørvisstýring, umhvørvisfrágreiðing, tilbúgvingarætlan og BAT[2].

Tann 9. mai avtalaðu IRF og Tórshavnar kommuna at viðgera uppskotini í felag saman við Rambøll a/s. Tórshavnar kommuna og IRF skrivaðu næstan einsljóðandi viðmerkingar til uppskotið um umhvørvisgóðkenning fyri brennistøðirnar, umframt at fimm fylgiskjøl frá Rambøll vórðu løgd við. Søkt varð um longda viðgerðartíð. Tann 24. juni vórðu viðmerkingarnar sendar Heilsufrøðiligu Starvstovuni. Hesar endaðu við eini umbøn um fund millum Heilsufrøðiligu Starvstovuna, Tórshavnar kommuna, IRF og Rambøll a.s. IRF sendi eisini politiskan kommentar viðvíkjandi krøvunum o. ø. í umhvørvisgóðkenningi til landsstýrismannin í umhvørvismálum.

IRF fekk tann 5. aug. 2003 »endaliga góðkenning« frá Heilsufrøðiligu Starvstovuni. IRF, Tórshavnar kommuna og Rambøll a/s verða ikki boðin til fundar at tosa um viðurskiftini. Skrivligu viðmerkingarnar eru bert í hendinga smálutum tiknar við í viðgerðini av revideraðu umhvørvisgóðkenningini.

Tann 25. august sendu IRF og Tórshavnar kommuna landsstýrinum fyribils kæru viðvíkjandi málsviðgerðini. Tann 17. september verður biðið um longda kærufreist. Av tí at valið í vetur kom upp ímillum, er málið enn ikki avgreitt.

## TYRVING

Í 2003 eru tyrvd 300 tons. Hetta er nakað minni enn í 2002.

## SERLIGA DÁLKANDI BURTURKAST

Samlaða nøgdin av serliga dálkandi burturkasti er rættuliga støðug og var 131,3 tons í 2003. Meginparturin, 100 tons, var akkumulatorar og trukkbattarí. Ein stórur partur av akkumulatorunum kemur frá kommunalu bingjuplássunum.

[2] *Best Available Techniques*

In order to minimize the waiting time, four men have been operating the service in 2003.

# INCINERATION

## THE INCINERATION PLANT

The incinerator was operating 7.708 hours or 321 days and nights in 2003, which is 17 days and nights less than in 2002. 16.858 t were incinerated compared to 18.470 t in 2002, or 2,19 t per hour.

Efforts have been made to find a solution, so that the incinerator can meet all implied standards at the end of 2005. Babcock&Wilcox Vølund ApS (BWV) has examined the incinerator in March 2003 and made a CFD[1] calculation of the incinerator.

The examination interestingly indicated that a minor reconstruction of the incinerator would increase the incinerating capacity by about 0,2 t per hour or about 1.500 t a year. We plan to reconstruct the incinerator in 2004.

## ORGANIC WASTE

All organic waste recieved at the plant goes directly into the waste storage bin together with the domestic waste. This sometimes causes problems and may even slow down the incinerating proces conciderably. It has therefore been decided to build a reception for organic waste and sludge next to the incineration plant. The new system should be able to handle sewage, sludge from gullies, leftovers from the fish farming industry etc.

Furthermore a system has been planned whereby contaminated water and water potentially infected by contagious fishdiseases is injected into the incinerator for cooling. Pollutants will be stopped by the new smoke cleaning filters.

By spraying the sludge directly into the incinerator, the incineration will become more steady and the capacity to handle organic waste will increase.

In 2003 IRF recieved 940 t of organic waste, 350 of which are from the fish farming industry, while the rest, 590 t, is from fish factories a.s.o.

## ENVIRONMENTAL APPROVAL

IRF recieved a draft of its future environmental approval from Heilsufrøðiligu Starvstovuni 7th May 2002. Since an expert from Rambøll a/s visited IRF that week, a meeting was arranged with Heilsufrøðiligu Starvstovuna on May 8th. At the meeting, some of the main technical issues in the approval were discussed e.g. registrating, smoke purification, environmental management, environmental report, contingency plans and BAT[2].

On May 9th IRF and Tórshavnar kommuna agreed to discuss the draft together with Rambøll a/s. IRF and Tórshavnar kommuna made almost identical comments on the draft of environmental approval of the incineration plants, with the enclosure of 5 documents from Rambøll. A request to exend the time limit to review the draft was put forward.

On 24th June the comments were forwarded to Heilsufrøðiligu Starvstovuna. In the letter we asked for a meeting with Heilsufrøðiligu Starvstovan, Tórshavnar kommunu and Rambøll.

IRF also sent to the minister of environmental issues, a political comment on, among other things, the requirements etc. of the environmmental approval. IRF got the »final approval« on August 5th 2003 from Heilsufrøðiligu Starvstovuni. IRF, Tórshavnar kommuna and Rambøll a/s didn´t get the opportunity to discuss the matter at a meeting with them. Only minor details from our written comments have become part of the discussion on the revised environmental approval. On August 25th IRF and Tórshavnar kommuna filed a prelimi-




[1] *Computational Fluid Dynamics*

[2] *Best Available Techniques*

Restin, góð 31 tons, er ymiskt serliga dálkandi ella vandamikið burturkast, sum málingaleivdir og framkallara- og fikseringsløgur, ljósrør og burturkast frá sjúkrahúsum.

### HAGTØL 2002-2003

Niðanfyri er ein samandráttur av hagtølum frá virkseminum.

### ENDURNÝTSLA

| Evni | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Pappír og papp, tons | 895 | 730 |
| Háorkuburtkst., tons | 305 | 460 |
| Jarn og metal, tons | 3.074 | 3.626 |
| Bilar, stk.* | 230 | 230 |
| Elektronikkur, tons | 28,8 | 16 |
| Spillolja, m³ | 3.022 | 2.380 |

### BRENNING

| Evni | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Brenning, tímar | 7.708 | 8.113 |
| Brent hjá IRF, tons | 16.858 | 18.470 |
| Brent hjá KB, tons | 802 | 1.050 |
| Brent í alt, tons | 17.660 | 19.520 |
| Brent IRF, t/h | 2,19 | 2,28 |

### TYRVING

| Evni | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Øska, tons | 2.693 | 1.624 |
| Sót, tons | 163 | 160 |
| Annað, tons | 300 | 375 |

### SERLIGA DÁLKANDI BURTURKAST

| Evni | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Akkumulatorar, tons | 99,8 | 96,2 |
| Máling, tons | 10,0 | 8,7 |
| Fotoveskur, tons | 2,2 | 4,7 |
| Annað, tons | 19,3 | 7,9 |

### ROTTANGATØMING

| Evni | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Tømdir rottangar | 7.732 | 7.868 |
| Ikki tømdir rottangar | 410 | 391 |
| Rottangaevja, m³ | 1.026 | 1.219 |
| Útløgd evja, m³ | 330 | 864 |
| Polymer nýtsla, m³ | 1,8 | 2,4* |
| Kálknýtsla, tons | 8,8 | 11,3 |

Eftir stóra vøksturin í burturkastnøgdunum í nítiárunum, kunna vit nú staðfesta eina minking fyri 2003, og gevur hetta okkum betri møguleikar at arbeiða víðari við kravdu broytingunum.

## YMISKT

### BÚSKAPARLIGA GONGDIN

Eins og undanfarin ár, er úrslitið fyri 2003 gott samanborið við ætlanina. Inntøkurnar eru sum mett, meðan útreiðslurnar eru 3% lægri enn mett frammanundan. Rakstrarúrslitið er 6,2 mió. kr. móti mettum 4,6 mió. kr.

### FRAMTÍÐARÆTLANIR

Arbeitt verður framhaldandi við at menna IRF, so at felagsskapurin megnar at taka ímóti og viðgera alt burturkast frá limakommunum á rættan hátt, og at leggja dent á og menna okkara endurnýtsluskipanir. Málið er framhaldandi at koma uppá sama støði sum hini norðurlondini, tá ið talan er um innsavning og viðgerð av burturkasti.



* *Úr Norðoyggjum, Sandoy og Suðuroy*

* *Í roknskapinum fyri 2002 stendur polymer nýtslan til at vera 5 m³. Hetta er ein feilur, har skuldi staðið 2,4 m³*

nary complaint to Føroya landsstýri with regard to the administrative procedures. On September 17th we applied for extended time limit for filing. Due to the general election in January, the case has not been dealt with yet.

### LANDFILLS

In 2003 300 t were landfilled, which is a bit less than last year.

### HAZARDOUS WASTE

The total amount of hazardous waste is steady and was 131,3 t in 2003. Most of it, 100 t, were accumulators and batteries from forklift trucks. The bulk of the accumulators are collected at the container stations.

The rest, about 31 t, is various hazardous waste such as remnants of paints, developer and fixative, fluorescent tubes and hospital waste.

### STATISTICS 2003

Brief statistics of the activity

### RECYCLING

| Sort | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Paper and cardboard, tons | 895 | 730 |
| High energy waste, tons | 305 | 460 |
| Iron and metal, tons | 3.074 | 3.626 |
| | | |
| Cars, pc* | 230 | 230 |
| Electronics, tons | 28,8 | 16 |
| Waste oil, m³ | 3.022 | 2.380 |

### INCINEATION

| Sort | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Incineration, hours | 7.708 | 8.113 |
| Incinerated at IRF, tons | 16.858 | 18.470 |
| Incinerated at KB, tons | 802 | 1.050 |
| Incinerated, total, tons | 17.660 | 19.520 |
| Incinerated per hour at IRF, tons | 2.19 | 2,28 |

### LANDFILL

| Sort | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Ashes, tons | 2.693 | 1.624 |
| Soot, tons | 163 | 160 |
| Others, tons | 300 | 375 |

### HAZARDOUS WATES

| Sort | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Accumulators, tons | 99,8 | 96,2 |
| Paint, tons | 10,0 | 8,7 |
| Developer, tons | 2,2 | 4,7 |
| Others, tons | 19,3 | 7,9 |

### DIGESTION TANK SERVICE

| Sort | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Emptied Digestion Tanks | 7.732 | 7.868 |
| Not emptied Digestion Tanks | 410 | 391 |
| Sludge from Digestion Tanks, m³ | 1026 | 1.219 |
| Spread Sludge from Digestion Tanks, m³ | 330 | 864 |
| Polymer use, m³ | 1,8 | 2,4* |
| Chalk, tons | 8,8 | 11,3 |

After the huge increase of the amount of waste during the ninities, a decrease is a fact in 2003, and this will make us more able to work on necessary changes.

## MISCELLANEOUS

### THE ECONOMY

As previous years the results for 2003 are good compared to the budget. The income is as estimated, while the expenses are 3% lower than estimated in beforehand. The profits are 6,2 mill. kr. compared to an estimate of 4,6 mill kr.

### PLANS FOR THE FUTURE

The work on developing IRF is going on, to make the coop able to take and treat all waste from the municipalities correctly, stressing the developement of recycling systems. The aim is to reach the same standard as the other Scandinavian Countries as far as collection and treatment of waste is concerned.

* *From the Northern Islands, Sandoy and Suðuroy*

* *In the account for 2002 the use of polymer is 5 m³. This is a mistake, it should have been 2,4 m³.*

# BÚSKAPUR

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Roknskapurin er settur upp eftir ársroknskaparlógini. Fíggjarstøðan er sett upp í kontohátti, meðan rakstrarroknskapurin er settur upp í frásagnarhátti, sundurbýttur eftir slagi. Roknskapirnir fyri ávikavist Spilloljuverkið, verkstaðið, rottangaskipanina, vandarmikla burturkastið og endurnýtsluskipanina eru settir upp fyri seg í serligum notum, og eru allir við í høvuðsroknskapinum. Roknskaparárið er tað sama sum álmanakkaárið.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

TÍÐARGREINING

Inntøkur og útreiðslur verða førdar í tí roknskaparári, tær hoyra til, uttan mun til, nær goldið verður.

Útreiðslunar eru soleiðis roknaðar við tað árið, vøran ella tænastan er móttikin, og inntøkunar tað árið, rætturin til tær er fingin. Hetta er til dømis galdandi fyri veitingarnar í 2003, sum eru goldnar í 2004, og fyri limagjald fyri desember 2003, sum verður goldið í 2004.

SUNDURBÝTING

Inntøkur og útreiðslur eru nágreiniliga býttar sundur eftir slagi.

AVSKRIVINGAR

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð og verða gjørdar við eins stórum prosentparti, sum niðanfyri tilskilað:

| | |
|---|---|
| Bygningar | 40 ár |
| Skrivstovuinnbúgv v.m | 10 ár |
| Maskinútgerð | 15 ár |
| Bilar og bingjur | 10 ár |
| Ruskpláss | 15 ár |
| Spilloljuverkið | 20 ár |
| Fyrireiking av rottangaskipanini | 5 ar |

SKATTUR

Sum interkommunalt lutafelag kemur felagsskapurin ikki undir skattskyldu.

## FÍGGJARSTØÐAN

MATERIELL STØÐISOGN

Allar materiellar støðisognir eru tiknar við til keypsviðrið minus samlaðar avskrivingar. Tól, ið kosta minni enn 20 t.kr., verða útreiðsluførd.

OGN Í UMFERÐ

Vørur á goymslu á verkstaðnum eru tiknar við í ogn í umferð til kostprís.

Skuldarar eru tiknir við við bókaðum virði. Tapsvandin er gjørdur upp fyri hvønn einstakan skuldara og er drigin frá.

VEÐSETINGAR V.M

Lánini frá Tryggingarfelagnum Føroyar eru tryggja við veð í matr. nr. 428b, Leirvík. Lánið frá Norðoyar Sparikassa er tryggja við veð í matr. nr. 121b og 121c, Norðagøta

# HØVUÐSTØL

| 1000 kr. | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | **2003** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | | |
| Limagjald | 27.415 | 30.586 | 31.846 | 32.266 | 32.596 | 35.399 | 37.097 | 39.062 | 41.419 |
| Aðrar inntøkur | 3.206 | 8.718 | 9.885 | 12.281 | 14.801 | 15.389 | 17.872 | 18.024 | 17.634 |
| **Inntøkur tils.** | **30.621** | **39.304** | **41.731** | **44.547** | **47.397** | **50.788** | **54.969** | **57.086** | **59.053** |
| **Útreiðslur** | | | | | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur | 17.569 | 25.958 | 27.592 | 29.140 | 32.726 | 35.816 | 38.319 | 41.723 | 40.320 |
| Rentuútreiðslur | 3.760 | 3.556 | 5.914 | 5.784 | 4.619 | 4.985 | 5.196 | 4.698 | 4.178 |
| Avskrivingar | 3.995 | 5.260 | 6.731 | 5.982 | 6.727 | 6.436 | 7.013 | 7.834 | 8.313 |
| **Útreiðslur tils.** | **25.324** | **34.774** | **40.237** | **40.906** | **44.071** | **47.237** | **50.528** | **54.255** | **52.811** |
